inni - trygt og ómaksleyst til hús

www.inni.fo



# Nýgg hús við panoramaútsýni á Viðareiði











## Alt er gjørt á besta hátt – bæði innan og uttan. Húsini eru sera snotulig – sterkt og væl bygd.

**Fyrsta fatanin**
Fyrsta fatanin er, at í hesi gøtuni standa eini hús, sum eru heilt serlig. Grannalagið er hugnaligt og grannarnir eru blíðir og fyrikomandi.

**Húsini**
Húsini eru bert 3 ára gomul í sera góðum standi og dygdin er avbera góð. Húsini eru nakað fyri seg og sera spennandi. Húsini hava tvær stórar altanir, eina í ovastu hædd og eina út frá stovuni í miðhæddini. Dustsúgvaraanlegg er á øllum hæddum og í miðhæddini er hitapumpa.

**Ljós og luft**
Húsini standa væl og frítt fyri. Vakurt útsýni er yvir Norðoyggjarnar, út á víkina og niðan í fjøllini. Tú kennir teg ongantíð innibyrgdan, tað kemur nógv ljós inn.

**Stílur og snið - inni og úti**
Stílurin er nýtímans lættur og ljósur. Húsini hava sprossavindeygu og eru klødd við timbri. Opni stílurin innan ger, at tú hevur gott samband við umhvørvið uttan, men hóast tað, er tað sera fjálgt inni hjá tær sjálvum. Húsini standa í friðaligum og barnavinarligum umhvørvi og hava sera gott útsýni.

**Bilhús**
Stórt bilhús er fast í húsinum, tú kanst ganga beinleiðis út í bilhúsið úr kjallaranum.

**Inrætting**
Í ovastu hædd er stórt útiloft við útgongd til altan, hjúnarúm, 2 kømur, klædnarúm og baðirúm við brúsu og gosbað. Í miðhæddini er durur, gongd wc, vaskirúm/goymslurúm, køkur/alrúm, stova við útgongd til altan og trappa upp á ovastu hædd. Í niðastu hædd er gongd, kjallararúm/fýrrúm, eitt stórt óinrættað rúm og garasja.

## Fakta:

**Adressa:** ........... Garðavegur 6, Viðareiði
**Býggiár:** ........... 2006
**Hæddir:** ........... 3
**Gólvvídd:** ......... 146 m²
**Grundøki:** ........ 595 m²
**Bilhús:** .............. ja



inni

P/F Inni | Niels Finsens Gøta 37 | P.O. Boks 364 | FO-110 Tórshavn | inni@inni.fo | Tlf. 320 410 | Fax 320 510